# Fogh stuðlar olympiskari viðurkenning

**Anders Fogh Rasmussen er sinnaður at stuðla føroysku royndini at fáa viðurkenning frá altjóða olympisku nevndini. Málið varð tikið upp á fundinum millum løgmann og danska forsætisráðharran mánadagin, og Fogh fer væntandi at geva sítt viðmæli**

IOC

*Stefan í Skorini*

Løgmaður Anfinn Kallsberg valdi at taka málið um royndirnar hjá Ítróttarsambandi Føroya at vinna altjóða viðurkenning frá olympisku nevndini til viðgerðar, tá danski forsætismálaráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, var á vitjan. Hann vísti vælvild, og teir báðir hava avtalað at taka málið uppaftur.

– Forsætisráðharrin var sera hugaður at stuðla føroysku royndunum, og avtalaðu Annfinn Kalsberg og Anders Fogh Rasmussen at samskifta skrivliga um málið í næstum, sigur ÍSF í einum tíðindaskrivi.

ÍSF er av álvara farið at brynja seg út, nú ítróttarsambandið hevur sett sær tað mál at fáa viðurkenning frá altjóða olympisku nevndini, IOC. Málið er at fáa umsóknina fyri nevndina á vári í 2003.

Seinni í ár verður fundur millum tey norðurlendsku ítróttarsambondini, og tá fer ÍSF at leggja hetta málið fyri luttakararnar. Væntandi fara øll tey norðurlendsku sambondini at taka undir við og stuðla føroyska ynskinum. Danska ítróttarsambandið hevur longu boðað frá sínum stuðli.

## Umráðandi við viðmælum

ÍSF ásannar, at tað er neyðugt við nógvum viðmælum frá politiskum leiðarum og øðrum ítróttarsambondum. Føroyska ynskið verður lagt fyri eina nevnd undir IOC, ið tekur støðu til, um lond og oyggjabólkar, ið søkja, skulu fáa limaskap. Tá er neyðugt at sannføra hesa nevndina um, at ÍSF er ein felagsskapur, ið lýkur øll krøv, ið IOC setir sínum limum.

Tí heitti ÍSF á løgmann, ið er verji hjá ítróttarsambandinum, um at taka málið upp við Anders Fogh Rasmussen. Løgmaður játtaði hesum, hóast skráin á fundinum var sera tøtt.

ÍSF ætlar at fáa viðurkenning frá hægsta politiska myndugleika í ríkinum. Hetta hevði styrkt umsóknina hjá ítróttarsambandinum.

– Hetta er bæði við til at geva umsóknini ans, men eisini til at tryggja okkum, at ríkisrættarliga støðan ikki verður nøkur forðing fyri olympiskari viðurkenning, sigur ÍSF.

Heðin Mortensen, forseti í ÍSF, er sera fegin um, at løgmaður vildi taka málið upp á fundinum. Hann metir, at eitt viðmæli frá einum statsleiðara vigar ógvuliga tungt og gevur okkum betri møguleikar at fáa viðurkenning.

– Støða Føroya í ríkinum ger, at ÍSF eftir olympisku reglunum má vísa á, at Føroyar eru eitt land, hóast Føroyar eru í einum samveldi við Danmark. Tí er tað sera umráðandi at kunna vísa á, at bæði løgmaður og forsætisráðharrin eru samdir um okkara støðu sum land í ríkinum, og at tað tænir bæði donskum og føroyskum áhugamálum at ÍSF fær hesa viðurkenning.

Fremsta málið hjá ÍSF er ikki at føroysk ítróttarfólk sleppa við til leikirnar, ið eru fjórða hvørt ár. Hinvegin sleppa føroysk ítróttarfólk við til kappingar fyri smærri limalond. Harumframt fær føroyskur ítróttur peningaligan stuðul ígjøgnum stuðulsskipanina hjá IOC.

Við einum viðmæli frá Anders Fogh Rasmussen er ÍSF komið eitt fet nærri viðurkenningini.



*Anders Fogh Rasmussen er sinnaður at stuðla føroysku royndini at vinna olympiska viðurkenning. Hann og løgmaður fara at taka málið uppaftur. Væntandi fer nývaldi forsætisráðharrin at stuðla ÍSF í umsóknini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Egon Thomsen til minnis

## 20.3.1947 – 31.12.2001

Meðan fólk her í sóknini fyrireikaðu seg til nýggjárshald, og at bjóða enn einum nýggjum ári vælkomnum, frættist, at so langt náddi onkur ikki. Sjálvan ársins seinasta dag fóru Merkini í hálva stong.

Egon Thomsen úr Froðba var brádliga farin; hann gjørdist bert 54 ára gamal.

Egon var næstelsti sonur Marina og Elias Thomsen, undir Skorðum í Froðba. Hann vakst upp har hjá góðum foreldrum, sum ein av fleiri systkjum.

Aftaná lokna skúlatíð, fekst Egon við ymisk arbeiði, til hann at enda fór at fáast við jørð og betong. Hetta kom at verða hansara lívsstarv.

Hann fekk sær útbúgving sum spreingimeistari, eins og hann tók fleiri skeið. Hetta, saman við nógvum royndum úti í ”markini”, skuldi gera hann føran fyri at átaka sær stórar uppgávur innan byggiøkið.

Teldukønur var hann eisini; bæði til skrivt, rokniskap og kønur var hann í ymiskum tekniforritum, slík sum verkfrøðingar nýta. Egon roknaði mong tilboð fyri ymiskar entreprenørar. Hetta sigur hvussu stinnur hann var, hóast onga akademiska útbúgving.

Rættiliga tíðliga í Egons byrjaði vánalig heilsa at leggja honum forðingar fyri at virka soleiðis, sum honum listi. Kortini royndi hann sum frægast, og legði hann mangt dygdargott verk úr hondum. Hann arbeiddi nógv sjálvstøðugt, men var eisini mangan knýttur at stórum verkætlanum, ið aðrir byggimeistarar stóðu fyri. Eisini heitti kommunan á hann um at gera skrásetingararbeiði.

Tá ið Tvøroyrar Kommuna í fjør søkti eftir verkfrøðingi til teknisku deild, heittu fleiri á Egon at søkja hetta starv. Honum líkt, var hann trekur - visti ikki um hann fór at megna arbeiði - men eftir fleiri áheitanir, søkti hann og fekk starvið.

Hetta var eitt minni kropsligt krevjandi arbeiði, ið hóskaði betur til ikki alt ov góðu heilsu hansara. Eisini var tað eitt arbeiði hann hevði stóran áhuga fyri og vitan um; drúgva vitan frá áralongum royndum í arbeiði innan býarmark.

Men Tvøroyrar Býráð hevði so sanniliga fingið fatur á rætta manninum, tað sannaðu tey, ið samstarvaðu við honum. Dugnaligur og góður at arbeiða saman við. Hann verður saknaður av teimum sum hava sína dagligu gongd á kommunuskrivstovuni.

Egon var vitugur maður, og visti um mangt og hvat. Honum dámdi væl at siga frá. Politikkur hevði hansara stóra áhuga, og var hann hollur stuðul hjá Suðuroyar Tjóðveldisfelag. Eitt skifti var hann eisini nevndarlimur.

Vit, sum kendu Egon, hava góð minnir eftir hann. Ein stillførur maður, ið ikki gjørdi uppgávurnar meira truplar enn neyðugt, men loysti tær so hvørt, sum tær stungu seg upp, á egnan og stillisliga hátt.

Framanundan Egoni, eru brøðurnir Hans Pauli og Jóan Petur, farnir, eisini í bestu árum. Nú Egon er farin somu leið, sita systkin við familju og ættfólk við sakninum. Men minnir liva eftir.

Friður verið við minninum um Egon Thomsen.

**Dan**




# Lærari søkist til Argja skúla

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara at byrja uml. 15. februar 2002 og skúlaárið út.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Lærugreinir: støddfrøði, danskt, kunningartøkni, náttúra og tøkni í miðdeildini. Landalæra í 9. flokki og Miðlabreyt. Møguleiki er fyri evt. broytingum.

Umsókn við møguligum prógvum skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. februar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlan, tlf. 314136.

**Skúlastýrið fyri Argja skúla**
v/ Maritu Simonsen
Støðlagøta 15
Argir



TK Stovan



# Kunningarfundir um virksemið hjá TK Stovuni

**verða kring landið á hesum støðum:**

**Mánakvøldið 21. januar á Hotel Vágum í Sørvági**
**Týskvøldið 22. januar á Hotel Føroyum í Havn**
**Mikukvøldið 23. januar í ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi**
**Hóskvøldið 24. januar í gamla Pakkhúsi í Vági**

**- allir fundirnir verða frá klokkan 19.00 til klokkan uml. 21.00**



**Skrá**

1. Alment um TK Stovuna
   - hvat kann TK Stovan bjóða vinnuni, íverksetarum, uppfinnarum o.ø.
   - kann TK Stovan hjálpa tær?
2. Ognarviðurskifti og ábyrgdir við ymiskum virkisformum: Firma, P/f og Sp/f - fyri íverksetarar og uppfinnarar
3. Hvussu kann eg meta mítt virki og samanbera tað við onnur virkir (Benchmarking)
4. Umboð frá lokalu deildini hjá Toll og Skatt greiða frá, hvørji rættindi og hvørjar skyldur virkir hava yvirfyri skattamyndugleikunum
5. Ymiskt
   - møguleiki er at seta viðkomandi spurningar

**Ynskiligt er at boðað verður frá luttøku á tlf. 31 73 66**



**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo **www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí víðfevnda danska TIC-kunningarsamstarvinum.



FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

# Prøvatakari m/k í Suðuroy

Fiskirannsóknarstovan sóknast eftir einum fólki at taka prøvar av fiskalandingum í Suðuroy.

Arbeiðið krevur nærlagni og áhuga og eina hampuliga góða heilsu, men annars ikki nakrar serligar fortreytir.

Arbeiðið umfatar longdarmáting og viging av fiski, ið verður landaður til uppboðssølu og/ella fiskavirkini, umframt at nytrar skulu takast og hartil hoyrandi skriviarbeiði. Hetta arbeiði er ein liður í stovnsmetingararbeiðinum hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Arbeiðstíðin lagar seg eftir, nær skip og bátar landa og er sostatt ikki fulltíðarstarv. Umsøkjarin má vera til reiðar at arbeiða ymsar tíðir á degnum.

Umsóknarfreistin er úti 1. februar 2002.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn



# Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur fra SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 5. feb. 2002 og á **Landssjúkrahúsinum** 6.-7. feb. 2002.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og mikudag kl. 10-12, í seinasta lagi mikudagin 30. jan. 02.



# Útbjóðing

Sumbiar kommuna bjóðar hervið út arbeiði at flyta 20.000 rúmmetrar av gróti frá grótdunganum á Lopranseiði oman í Ónavík, har tað skal leggjast út til havnaøkið.

Boðini skulu verða Sumbiar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 28. januar 2002 kl. 1800.

Fleiri upplýsingar um arbeiði kunnu fáast við at venda sær til Sumbiar kommunu á telefon 224894.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini ella havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344
Fax +298 370114



Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg